†

## Andlát og jarðarferðir

**Niels Juul Arge** fyrrverandi klokkari í Klaksvík, andaðist á Klaksvíkar Sjúkrahúsi sunnudagin 18. mars 82 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

Kistan við **Óluvu Samuelsen, Klaksvík**, fer frá kapellinum á Klaksvíkar sjúkrahúsi í kvøld klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni týsdagin klokkan 13.30. Tey, ið vilja minnast Óluvu, kunnu lata Mikladals Sóknar fráhaldsfelag eina peningagávu, konta í Norðoya Sparikassa.

# Heðin Nielsen, 70 ár

Í dag, 19.mars, fyllir Heðin Nielsen í Havn 70 ár. Heðin er upprunaliga eiðismaður, sonur Eli hjá Nikkel og Jacobinu, sum var ættað úr Tjørnuvík.

Tey fingu tveir synir Heðin og Súna. Tá Heðin var 10 ára gamal druknaði Súni við sjóvarmálan á Eiði, 4 ára gamal.

Í 1949, tá Heðin var 12 ár, gjørdu foreldrini av at flyta til Havnar. Mamman vildi ikki uppliva at missa báðar synirnar á sjónum. Tí skuldi Heðin fáa eina útbúgving, so hann kundi fáa arbeiði á landi. Hetta gjørdist best við at búgva í Havn.

Heðin fór beint í realskúla og síðan í Handilsskúla. Hansara lívsstarv kom tí at vera at arbeiða á skrivstovu. Hann var í mong ár á skrivstovuni hjá Kimbil, reiðarínum hjá Poul Hansen, sum var og er kent fyri at rokna væl av. Her kom hann eisini at kenna nógvar fiskimenn. Sjálvur var eg í reiðarínum mitt í 60-unum og kom tá at hitta Heðin fyrstu ferð. Seinni giftist eg inn í familjuna. Tá kom eg at kenna Heðin sum ein fróðligan og fyrikomandi mann, sum tað altíð er stuttligt at koma í prát við.

Aftná tíðina við Kimbil hevur Heðin arbeitt á postverkinum, Nordbil og Almannastovuni, og har hann hevur



verið hevur hansara partur ikki ligið eftir.

Fyri tað um Heðin er pensjoneraður er hann framvegis virkin, tí hann hevur so mong áhugamál. Náttúran og gongutúrar hevur stóran áhuga. Hann er eisini fittur í hondunum. Hann dugur væl at mála, og tað liggur eisini væl fyri at smíða.

Konan er Jutta, sum er ættað av Slættanesi. Hon er eisini fróðlig eins og Heðin.

Sambandið til Eiðis og Slættanes hevur ført til, at tey hava hús í báðum støðum, og afturat tí hava tey hús í Gásadali, har Jutta hevði ætt. Hetta man geva einum og hvørjum 70 ára gomlum nóg mikið at gera.

Jutta og Heðin eiga fýra børn, og eru tey Magni, Marjun, Jacobina og Hildur. Abbabørnini eru 9 í tali. Øll búgv tey í Havn, og tí liggur væl fyri hjá familjuni at koma saman, og tað koma tey eisini, tí Heðin og Jutta eru eisini familjumenniskju.

Tað verður ynskt Heðini hjartaliga tillukku við hansara "støvets år", sum tó ikki merkja hann á nakran hátt.

**Ó.**

# Heðin Nielsen sjeyti

Tann 19. mars 1937 var Heðin Nielsen borin í heim. Vit í familjuni eru takksom fyri, at vit hava henda merkismann okkara millum, og vilja vit tí heiðra honum við nøkrum fáum orðum, ið einki hava av týdningi, skulu tey samanberast við hansara avrik fyri okkum, ið eru rundan um hann til gerðandis.



Heðin er føddur og uppvaksin á Eiði. Altíð hevur hann víst til, hvaðani røturnar stava, og eisini hevur hann hús í føðibygdini, sum hann og konan vitja javnan.

Heðin er sera trúfastur og hjálpsamur, so ikki er neyðugt at biðja hann um hjálp til eitthvørt tvær reisur. Hartil er hann hegnismaður um ein háls og sera dugnaligur til alt handaligt.

Málningarnir, ið hann hevur latið úr hondum, eru ikki so fáir, og málar hann upp á "gamla" mátan, har landslagið kemur til sín rætt.

Eisini træsmíð er hansara áhugi, og hann man hava gjørt fjallstavar til flest øll børnini og abbabørnini.

Summar sum vetur ferðast hann saman við Juttu á hvørjum tindi, og hartil er Heðin íðin innan gongufelagið í Havn, og ikki minst eru bæði hann og Jutta sera virkin í Fuglafrøðifelagnum.

Heðin fekk sær konu av Slættanesi og hevur skrivað søgu um Bygdina, ið er honum sera kær. Honum dámar eisini sera væl at verða á "nesinum", og mangur veiðumaður á nátaferð hevur notið gott av hansara søguvitan um bygdina. Sjáldsama blíða lyndi hansara hevur altíð verið við til at drigið til sín.

Fyri kortum bygdu tey sær heim í Gásadali, har konan hevur røtur, og Heðin trívist best millum "bygdarmenn".

Hann arbeiddi nógv ár sum skrivstovumaður hjá Kimbil.

Síðstu mongu árini, áðrenn komið varð til pensiónsaldur, var hann skrivstovumaður á Almannastovuni, líka til hann legði frá sær fyri aldur fyri góðum trimum árum síðan.

Tey bæði eiga børnini Magna, Marjun, Jacobinu og Hildur, og við árunum eru ommu- og abbabørn teirra vorðin níggju í tali.

Vit í familjuni vilja ynskja tær, Heðini, góðan byr í komandi árum.

**Familja & Vinir**

# Ein unglingi fyllur hálvthundrað



*Waldemar Nowicki og Piotr Krakowski*
*mynd: b71-sandoy.com*

Í dag fyri hálvthundrað árum síðani, í 1957, sá Piotr Krakowski á fyrsta sinni verðina. Borin í heim mitt millum tvey stór ríki, Sovjetsamveldið fyri eystan og Týskland fyri vestan. Lítið grunaði maðurin, at hann ein dag skuldi búseta seg í einum av heimsins minstu londum: Føroyum.

Árið er 1989. B71 hevur árið fyri vunnið sær rætt til fótbólt í fremstu deildini. Pólski B71 venjarin Jan Kazcynski, ið var komin higar til lands í 1987, hevur fingið samband við tveir pólskar leikarar. Annars málverji úr pólska 1.deildarfelagnum Olimpia Poznan og hin miðvallari úr 2.deildarfelagnum Zaglebie Lubin, men við 12 ára royndum í 1.deildarfótbólti í heimlandinum. Hesir báðir skulu hjálpa B71-liðnum at tryggja sær víðari luttøku í føroysku 1.deild. Royndin eydnast væl. B71 vinnur FM-heitið í allarfyrstu royndini. Piotr Krakowski og Wieslaw Zakrzewski styrkja liðið munandi.

Árið er 2006. Heystardagurin er komin á vitjan, men líka leggja sundalagsfólk í kulda. Teirra lið, EB/Streymur við Piotr Krakowski sum venjara, er 90 minuttir frá søguligum FM-heiti. Tíðin gongur, og nú eru bert nakrir fáir minuttir til hetta er veruleiki. KÍ er á odda 1-0 á Mølini, men HB hevur ikki skorað í Gundadali móti ÍF. Men so rapa Jerikos-múrar, tá ið Vagnur Mohr Mortensen blæsur í HB-trompetina og skallar bóltin upp um ungverska ÍF málverjan. HB hevur stolið meistaraheitið frá Piotr og hansara monnum. Møguleikin at vinna FM-heitið við trimum ymiskum feløgum er gloppin Piotr av hondum í allarsíðstu sekundunum. Í 2001 vann hann greipuna við B36.

Anno 2007 eru 18 ár liðini, síðani Piotr fyrstu ferð sá føroysku fjøllini. Fimta árið á rað venjari norðuri í Sundalagnum. Fimta føroyska felagið við Piotr við róðrið.

Góða eydnu frændi og hjartaliga tillukku við hálvthundrað degnum. Takk fyri nógvar góðar løtur í føroyskum fótbólti, ikki minst í B71.

## Tøkk

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenlsu og alla hjálp við jarðarferðina hjá

**Jógvani Adolf Johannesen**
Dali

**Inga**
**Vitus og Turið**
**Hans Marius og Bergljót**

## Tøkk

Øllum tykkum, sum við gávum, blómum og vitjan gleddu meg á 80 ára degnum, takki eg hjartaliga.
Takk, Georg fyri sangin.

**Heilsan**
**Anna Eystan Á**